Myndir: Beinta Haraldsen



# Súsanna, Ria og Hans Tórgarð heiðrað

## Ólavsøkudag fingu tey trý systkini Súsanna, Ria og Hans Tórgarð handað Listavirðisløn Miðlahúsins fyri teirra arbeiði og leiklut innan føroyskan sjónleik

LISTAVIRÐISLØN

Tað var Jan Müller, forstjóri í Miðlahúsinum, sum handaði teimum virðislønina uppá tilsamans 75.000 kr. Tiltakið fór fram við standmyndina av Nólsoyar Páll í Vágsbotni stutt eftir, at tingið varð sett. Vit prenta her røðuna, sum Jan Müller helt:

Góðu ólavsøkugestir, góðu virðislønarmóttakarar, Súsanna, Ria og Hans Tórgarð. Hjartaliga vælkomin til hesa hátíðarløtu, har vit handa Listavirðisløn Miðlahúsins

Leiklistin ella dramaið er ein hin elsta listagrein í heiminum. Í Føroyum er áhugaleiklistin gomul og sjónleik hava fólk spælt leingi í Føroyum.

Hinvegin er leiklistin sum yrkislist ella sum professionell listagrein ung í landi okkara og byrjaði ikki av álvara fyrr enn fyrst í sjeytiárunum, tá ið Eyðun Johannesen kom heimaftur og stovnaði yrkisleiklistabólkin Grímu.

Øll list hevur týdning fyri menniskjuni, og tí hevur menniskjan allar dagar tikist við list og listarligt virksemi. Vit eiga tí sjálvsagt ikki at taka eina listagrein fram um aðra.

Hetta hava vit í Miðlahúsinum ásannað, og tí hava vit sett á stovn eina listavirðisløn. Ætlan okkara er at listafólk umboðandi skiftandi listagreinir skulu verða heiðrað her á okkara tjóðardegi – her við standmyndina av Nólsoyar Páll, sum hevur so stóran týdning fyri okkara samleika og sum sjálvur var listamaður.

Henda virðisløn skal soleiðis vera við til at minna okkum á, hvønn týdning list og listarligt virksemi hava fyri okkum menniskju, okkara samleika og harvið okkara trivnað.

Úti í heimi gerst tað alt meira vanligt, at privatar vinnufyritøkur stovna listavirðislønir ella stuðla mentan og list á ymsan hátt. Privatar fyritøkur branda seg við at stuðla mentan og list. Hetta er gott fyri mentan og list og tað er eingin loyna at hetta tíbetur eisini er gott fyri vinnulívið.

Vit í privatu vinnuni í Føroyum kundu ivaleyst gjørt nógv meira í hesum sambandi og er hetta so ein orsøkin til at Miðlahúsið hevur tikið stig til hesa virðisløn, sum vit skipa fyri, men sum verður sponsorerað av privatum vinnufyritøkum og ávísum kommunum. Eg vil nýta høvið at takka sponsorunum.

Sponsorarnir eru: Tórshavnar kommuna, Kvívíkar kommuna, Føroya Banki, Føroya Tele, Hotel Føroyar, Poul Hansen heilsøla og Tryggingarfelagið Lív.

Vit eiga sjálvsagt at virða okkara listafólk uttan mun til hvørja listagrein, tey nú einaferð takast við. Vit eiga í Føroyum sera nógv og sera dugnalig listafólk. Tað er tí ikki heilt einfalt at gera av, hvør ella hvørji, ið skulu fáa hendan heiður.

Vit mugu velja og hesuferð fall valið á tey trý Tórgarðssystkini, Súsonnu, Riu og Hans, sum nú í út við tjúgu ár av teirra lívum, burturav, hava halgað seg sjónleiki og leiklist.

Men samstundis eiga vit at hava í huga, at henda virðisløn so eisini skal síggjast sum ein viðurkenning av tí stóra arbeiði, sum allir føroyskir yrkissjónleikarar gera úti sum heima.

Teir tríggir heiðursgestirnir hava heilt frá barnsbeini av havt áhuga fyri leiklistin og fyri at spæla sjónleik. Tey hava fingið áhuga fyri mentan og list í vøggugávu í einum mentanarliga ríkum heimi, og hesa gávu hava tey umsitið. Tey hava í eini tjúgu

Sosialurin